# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 04.04.2018 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Rúni Thomsen (fyri Niels Olaf Eyvindsson)
Niels Jacob Thomsen
Gunnhild Mortensen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 2

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul til virksemið hjá Bláa Krossi í Suðuroy.**
   Samtykt varð við fimm atkvøðum fyri, eftir uppskoti frá Eir, at stuðla við kr. 2.500.

2. **Umsókn um stuðul til námsferð frá 7. og 8. flokki í Hvalbiar skúla:**
   Søkt verður um stuðul til námsferð til Spania. Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 500 fyri hvønn persón, ella kr. 8.500 íalt.

3. **Umsókn um stuðul til nýggjárshald frá Nýggjársnevndini í Nesi.**
   Søkt verður um stuðul til komandi nýggjárshald í Nesi.

   **Fíggjarnevndin 04.04.2018:**
   Nevndin mælir til at stuðla við kr. 10.000 eins og undanfarin ár.

   **Avgerð:** Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

4. **Innkomið tilboð frá Innspark uppá grasmáttur til dagstovnin.**
   Trivnaðarnevndin hevur biðið Innspark um tilboð uppá 25 stk. grasmáttur til uttanduraøkið á dagstovninum.

   **Trivnaðarnevnd 26.03.2018:**
   Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Innspark kr. 14.375 uttan MVG.

**Fíggjarnevndin 04.04.2018:**
Einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá Innspark.

**Avgerð:** Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum frá nevndunum.

Janus Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 5.

5. **Tilboð uppá dekk / fríholt til havnina á Hamranesi.**

Vega- og havnanevndin hevur kannað prísir hjá ymiskum veitarum av dekkum / fríholtum til bryggjuna á Hamranesi, tá hesi eru í sera ringum standi.

| | |
|---|---|
| J & K Petersen | kr. 4,00 pr. kg. uttan MVG |
| Rókin | kr. 2.500,00 pr. stk. uttan MVG, frakt v.m. |
| Trolvirkið Bergið 1600x500 mm | kr. 3.030,00 pr. stk. v/MVG, latin í Hvalba |
| Trolvirkið Bergið 1700x670 mm | kr. 3.950,00 pr. stk. v/MVG, latin í Hvalba |

**Vega- og havnanevnd 26.03.2018 og 04.04.2018:**
Nevndin hevur viðgjørt tilboðini og mælir til at taka av tí seinna tilboðnum frá Trolvirkinum Bergið kr. 265.440 tilsamans uttan MVG fyri 84 stk., tá hesi dekkini hava tær dimensiónir, ið ynskiligt er. Eins og í fyrra tilboðnum eru holini til dekkini boraði í og vøran latin til Hvalbiar.

**Fíggjarnevndin 04.04.2018:**
Mælt varð til at taka av tí seinna tilboðnum frá Trolvirkinum Bergið kr. 265.440 uttan MVG.

**Avgerð:** Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum frá nevndunum og taka av tilboðnum frá Trolvirkinum Bergið.

6. **Kunning ymiskt.**

7. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.20

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Niels J. Thomsen

Gunnhild Mortensen Sten Spange Larsen Rúni Thomsen